menneskeliv på et direkte forkert grundlag og med et meget spinkelt flertal. Den debat synes jeg at det danske Folketing og det danske folkestyre burde tage op. Det kan ikke være rigtigt, at hverken en krig eller en fortsættelse af besættelsen af Irak kan bygges på så spinkelt et demokratisk grundlag. Der burde være en mindretalsbeskyttelse eller et eller andet, der gjorde, at så fatale fejl ikke gentages.

Vi hører argumenterne her i dag, hvor det vel egentlig er et argument, hvor man på den ene side bruger jungleloven og den stærkes ret, den stærke har altid ret, mens andre, mindretallet, prøver at argumentere ud fra saglige, demokratiske, humanitære spørgsmål. Og det er jo en debat, der ikke fører nogen vegne. Hvis man går ind for den stærkes ret, hvis man går ind for jungleloven, ja, så er vel egentlig en debat i Folketinget ikke mulig. Så taler man ud fra helt forskellige grundlag, og så kommer man ikke videre i den sag.

# Einasti menningararmøguleiki er størri kommunur

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



**Um ikki kommunur vilja leggja saman frívilliga, eigur at verða lóggivið. Tað var ein av ósemjunum okkara millum, meðan eg sat sum landsstýrismaður, sigur Jógvan við Keldu m. a.:**

Í dag verður so gott sum øll umisiting av føroyska samfelagnum framd í og úr høvuðsstaði okkara.

Tórshavnar kommuna umsitur part av egnari kommunu, men er før fyri meiri enn hon nú ger, tí støddin er har.

Landsumsitingin umsitur stóran part av Tórshavnar Kommunu, meðan landsumsitingin samstundis umsitir nógv størsta partin av kommununum úti um í landinum, sum eru so smáar, at tær ikki eru førar fyri at umsita, tá umrædur veruligan gevandi kommunalpolitikk.

Tosað verður um, at alt verður sentralt stýrt út frá høvuðsstaðnum. Høvuðsorsøkin til hetta er, at kommunupolitikarar ikki vilja síggja umsitingarliga veruleikan í eyguni.

Er ætlanin, at henda gongdin skal halda fram, at ongar umsitingar skulu út um høvuðsstaðin, so skulu kommunu– og eisini landspolitikarar bert lata standa til. So slepst undan støðutakanum. Men rætt er tað ikki.

### Suðuroyggin roynir í løtuni

Tað er ikki nóg mikið ídag, at ein kommuna bert hevur førleika at umsita m. a. kloakkir, vegagerðir, nakrar útstykkingar, nú eisini barnaansingarøkið, og á fólkaskúlaøkinum bert umsitingar av bygningum. Seinasta skotið á bulinum ein vanskabningur av barnaverndarøkinum, har kommunur ikki sjálvar ráða, men limir úr ymsu kommunum hava fingið síni umboð í økinum. – Hetta er ikki verulig kommunal um– og fyrisiting. Dømi eru eisini um, at hetta kann gerast ein hurluvasti við einum fjákutum vali av samstørvum.

Vit kunnu fegnast um arbeiði Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri nú ger, fyri at fáa Suðuroynna savnaða í eina kommunu. – Hetta er møguleikin – ja einasti møguleiki – hjá Suðuroynni at yvirliva.

Kommunurnar mugu »ganga plankan út«!

### Einasti møguleiki

Visión 2015 skal innibera størri og færri kommunur, sum er einasti møguleiki fyri at fáa umsitingar úti um í landinum.

Tað tykist, sum bæði formaður Javnaðar– og Fólkafloksins eru ímóti at leggja trýst á kommunurnar fyri samanlegging. Hetta hevur møguliga sín uppruna í geografiska plássinum, teir búgva í.

Einki endamál er at tosa um eina visión 2015, um ikki stigini verða tikin nú, so henda visión kann gerast veruleiki. Sum nú er, gerst hetta ikki annað enn innihaldsleyst prát, sum politiska skipanin framhaldandi kann fóðra og møuliga hugtaka føroyska fjølmiðlaheimin við.

Einasti møguleiki fyri at økini veruliga kunnu mennast er størri umsitingarligar eindir við størri kommunum. So koma eisini onnur mál við tíðini út á økini.

# Fyrsti tjóðskaparflokkur føroyinga 100 ár

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



Sambært ensku orðabókini "Oxford Advanced Learners Dictionary" er "ein myta": "Something that many people belive but that does not exist or is false". Á føroyskum: "Nakað sum nógv fólk trúgva, men sum ikki er til ella er skeivt".

Í bókini "Mellem færøsk og dansk politik 1917-1920", sum m.o. danski søgufrøðingurin Vagn Wåhlin hevur skrivað, verður føroysk søga nevnd sum full av "mytedannelse". Bókin viðurkennir, at tað ávís tíðarskeið kann vera neyðugt hjá eini tjóð at hava hetjumyndir og eintáttaðar áskoðanir á søguligar hendingar og fyribrigdi. Sambært Vagn Wåhlin er heldur einki óvanligt í, at ein tjóð skapar sær søguligar hetjumyndir. Vandin liggur ikki í hesum, men harafturímóti er søguliga vandamikið, tá nøkur menniskju verða skýrd at vera minni verd, bert tí, at tey vístu sokallaðu hetjunum mótstøðu. Eisini er vandamikið, at "… efter en vis periode kan sådanne opfattelser blive fastlåste som en myte og dermed lukke af for nødvendige diskussioner…."

Við at nýta søguna at náa ávísum politiskum málum kemur ein tjóð í nakrar trupulleikar, sum vit kenna alt ov væl her á landi. Tað er tá vit byrja at bólka okkum í pro– og anti-tjóðskaparligar føroyingar.

Er tað nakað sum vísir seg at vera sera átrokandi hjá politikarum sum heild, ikki bert í Føroyum, men eisini aðrastaðni, so er tað at arbeiða hart fyri at seta politisk mótstøðufólk í bás t.v.s at vit gera alt fyri at læsa og binda hvønn annan niður, soleiðis at mótstøðufólkini verða har, sum vit meta og siga, at tey skulu verða. Hetta eru vit vitni til so at siga hvønn dag frá tingsins røðarapalli.

Orsøkin til at vit gera hetta er í veruleikanum tann, at vit sum politikarar eru bangin fyri, at aðrir politiskir flokkar gerast í so naskir eftir okkara hugskotum ella hugsjónum, tí tað kann kosta atkvøður og vald.

Vit skapa eina breiða tjóðskaparsemju um eitt nú eina nýggja stjórnarskipanarlóg við at lurta og síðani grundgeva, og ikki við at nýta alla okkara orku til at útgreina okkara fatan av, hvussu aðrir flokkar altíð hava verið.

Søgan er ikki svørt og hvít, men er heldur ein samanseting av ymiskum fjøltáttaðum veruleikum. Føroyska søgan eru í alt ov stóran mun skrivað í svørtum og hvítum, og er tí við til at staðfesta mytuna um, at partar av Føroya fólki ikki torir at taka ábyrgd, ella at partur av Føroya fólki vil verða húskallur hjá Danmark.

Hetta eru setningar og ákærir sum vit sleingja um okkum uttan at hugsað um, at meira orku og tíð vit brúka til at skapa mytur um hvønn annan, minni tíð brúka vit til veruligan politikk, sum hevur til endamáls at skapa búskaparvøkstur.

Grundleggjandi spurningurin, vit øll eiga at seta er: Hvat fyri samfelag vil eg liva og virka í? Hvussu eri eg, við mínari hugsan og mínum atburði, við til ávikavist at stuðla og forða hesum samfelag í at gerast veruleiki?

Stórur partur av føroyskari søguskriving er anti danskur. Skrivingin metir ofta ein føroying í mun til Danmark ístaðin fyri at meta útfrá umheiminum øllum sum hann er. Hinvegin kunnu vit eisini staðfesta, at tjóðveldisrørðslan hevur dugað betur at sloppið sær framat við teirra útgávu av føroyskari søguskriving.

Tann 18. august 1906 boðaðu 13 av 22 tinglimum frá í Dimmalætting, at teir høvdu skipað seg í ein politiskan flokk á tingi, ið nevndi seg "sambandsmenn". 12 av hesum tinglimunum vóru fólkavaldir, meðan tann trettandi var próstarin Fríðrikur Petersen, sum eisini gjørdist fyrsti formaður Sambandsfloksins. Tað var hann, sum í 1902 helt fyrstu prædiku á føroyskum í eini føroyskari kirkju.

Fyri ein stóran part hevur Sambandsflokkurin verður ein hóvligur flokkur, men við tí stóra verkinum, sum flokssøgan, ið verður útgivin í summar er, vil Sambandsflokkurin koma til orðanna og siga sína egnu søgu, og vónandi fáa fólk eitt sindur størri innlit í, hvussu trupult tað er at meta gamlar tíðir út frá degnum í dag.

# Stuðul til infrakervið í útoyggjum

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



**Opið bræv til landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm**

Tann 1. januar 2006 kom løgtingslóg nr. 137 frá 13. desember 2005 um at veita stuðul til íløgur á infrakervið á útoyggjum í gildi. Henda lóg er framhald av løgtingslóg nr. 50 frá 10. apríl 2003 um at veita stuðul til infrakervið á útoyggjum, ið sambært egnum innihaldi fór úr gildi við árslok.

Fyrst av øllum vil Tórshavnar kommuna gera vart við, at kommunan á ongan hátt tekur undir við framdu lógarbroytingini.

Harumframt er framferðarhátturin í hesum máli ikki nøktandi, tí kommunan, ið lógarbroytingin beinleiðis viðvíkur, ikki er tikin við uppá ráð. Hetta er at vísa lítla virðing fyri teirri serligu støðu, kommunurnar eru í, umframt at hetta má metast at vera rættiliga óheppin háttur at fyrireika nýggjar lógir.

Gásadalur og Nólsoy eru ikki longur nevndar í lógini. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið verður mett, at Gásadalur og Nólsoy ikki eru útoyggjar sambært lógaruppskotinum, t.e. útoyggjar, sum liggja avsíðis við avmarkaðum ferðasambandi og tænastum til borgaran.

Ein avleiðing av lógini, ið kom í gildi 1. januar 2006, er sostatt, at kommunurnar, ið varða av Gásadali og Nólsoy ikki longur kunnu søkja um stuðul til íløgur á infrakervið á hesum støðum. Hóast hetta er lógaruppskotið hvørki sent kommununum ella kommunufeløgunum til ummælis. Kommunurnar eru heldur ikki kunnaðar um broytingarnar, ið lógin hevur við sær.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at avleiðingarnar av uppskotinum fyri kommunurnar eru, at útoyggjar, sum liggja avsíðis og hava avmarkað ferðasamband og avmarkaðar tænastur til borgaran, kunna søkja um stuðul til íløgur í infrakervið. Hóast ávísar kommunur ikki longur kunnu søkja henda stuðul, er hetta ikki upplýst sum ein avleiðing av lógaruppskotinum.

Tórshavnar kommuna hevur m.a. heft seg við, at eftir lógini frá 2003 kom Kalsoyggin bara undir lógina, tá tað ræður um íløgur í samskiftiskervið, men nú arbeiðið at gera samferðsluhavnina á Syðradali varð liðugt í 2005, er Kalsoyggin fevnd av lógini á jøvnum føti við aðrar sokallaðar útoyggjar.

Ilt at sígga nakran prinsipiellan mun á Nólsoynni og Kalsoynni, tí báðar liggja nakað frá størru oyggjum ella meginøki. Verður hugt at ferðasambandi og tænastum til borgarar, ið búgva á hesum oyggjum, ber somuleiðis illa til at siga, at onnur oyggin liggur meira avsíðis, hevur meira avmarkað ferðasamband ella færri tænastur til borgaran, tí á fjarstøðu til meginøkið og títtleika á ferðasambandi er at kalla eingin munur. Einasti munurin er, at onnur oyggin hoyrir til høvuðsstaðarkommununa, meðan annar parturin av Kalsoynni hoyrir til Klaksvíkar kommunu, og hin er sjálvstøðug kommuna. Tórshavnar kommuna undrast tí á gjørdu broytingarnar.

Sum nevnt tekur Tórshavnar kommuna ikki undir við framdu lógarbroytingini, tá henda ikki viðger sambæriligar oyggjar líka. Tí verður staðiliga heitt á Vinnumálaráðið um at taka málið upp aftur og saman við kommununum viðgera spurningin um, hvørjar oyggjar skulu koma undir lógina og ikki.

Tórshavnar kommuna vónar at enda, at framtíðar lógarbroytingar ikki verða framdar yvir høvdið á kommununum eins og í hesum máli, men at Vinnumálaráðið sjálvsagt sendir kommun unum ella kommunufeløgunum lógaruppskot til ummælis, tá hesi hava avleið ingar fyri kommunurnar.

Umframt at kommunan gongur út frá, at henda mannagongdin ikki kemur fyri aftur, verður við hesum heitt á tygum um at taka málið uppaftur og saman við kommununum at viðgera spurningin um, hvørjar oyggjar skulu koma undir lógina og ikki. Tórshavnar kommuna er altíð til reiðar at koma á fund um málið.

(Avrit av hesum brævi er eisini sent løgtingslimunum í Suðurstreymoy og fjølmiðlunum).

*hedin@torshavn.fo*